# stuðulsfólkaskipanin fyri børn

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO TEL 4780 80

Studulsfólkaskipanin fyri børn er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi børn og ung ið bera brek. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast gott 100 stuðlar, samskiparar og stuðulsráðgevar.

Stuðulsfólkaskipanin fær støðugt nýggjar avbjóðingar, sum seta stór fyrisitingarlig krøv. Søkt verður tí eftir tveimum fólkum til fyrisitingina av Stuðulsfólkaskipanini.

Fyristingin skal reka skrivstovuna, tryggja ein javnan rakstur og tryggja at Stuðulsfólkaskipanin lýkur øll krøv til almenna fyristing. Eisini skal fyrisitingin, saman við stuðulsráðgevunum, fáa til vega og greina hagtøl um stuðulstørvin til leiðsluna og politiska myndugleikan.

Stuðulsfólkaskipanin virkar um alt landið, alt samdøgrið, árið runt. Tað krevur tí eitt stórt og miðvíst arbeiði at knýta starvsfólkini saman og at fremja samstarv og vitanarbýti. Komandi árið verður stóra avbjóðingin at gera umstøðurnar hjá starvsfólkunum í skipanini enn betri við einum virknum og mennandi starvsfólkapolitikki og einari útbygdari starvsfólkatænastu. Fyrisitingin er tá tann ásin, sum flestu spurningarnir fara um. Leitað verður tí eftir fólki, sum eru fús at taka av avbjóðingum og sum megna at lofta nøgvum spurningum og uppgávum í senn.

Arbeitt verður í einum tøttum toymi, við sera sjálvstøðugum ráðgevum, sum ynskja at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi saman við ágrýtnum fólki, sum sjálvi megna at evna síni størv eftir arbeiðsuppgávunum, áhuga og førleika.

## Sóknast verður eftir
## FÍGGJAR- OG FYRISITINGARFULLTRÚA

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn sóknast eftir einum vælútbúnum fólki at standa fyri bókhaldi, lønar- og fíggjarstýring. Starvið umfatar eisini at fáa til vega hagtøl til leiðsluna í tøttum samstarvi við stuðulsráðgevararnar og at gera fíggjarligar metingar, lýsingar og framrokningar.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
· Bókhald
· Lønar- og starvsfólkaviðurskifti, m.a. sáttmálaviðurskifti
· Ábyrgd av starvsfólkajournal og menning av vaktarskipan
· Hagtalsarbeiði og lýsingar av virkseminum í stuðulsfólkaskipanini
· Ábyrgd av hølisviðurskiftum og útbúnaði

**Førleikakrøv**
· Viðkomandi útbúgving innan roknskap og fíggjarstýring
· Sera góðan telduførleika
· Gott hegni at skriva og góðan málsligan førleika
· Góð samstarvsevni

## Sóknast verður eftir
## SKRIVSTOVUFÓLKI

Søkt verður eftir einum nærløgdum og fyrikomandi skrivstovufólki til alt vanligt skrivstovuhald og til aðrar uppgávur á skrivstovuni hjá Stuðulsfólkaskipanini.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
· Móttøka og telefonavgreiðsla
· Postur og skráseting
· Dagføring av vaktarskipan
· Lønarskráseting, setanarbrøv v.m.

Eisini kemur tú at hava nógv samskifti við stuðulsfólk, og kemur saman við stuðulsráðgevunum at fyriskipa alt tað praktiska um skeið og fundarvirksemi.

**Førleikakrøv**
· Skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving og royndir
· Royndir við skráseting
· Góðan telduførleika
· Góðan málsligan førleika

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Meiri fæst at vita við at venda sær Oyvind av Skarði, leiðara, allar yrkadagar millum kl. 10 og 12 á tlf. 353570.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum v.m. og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. august 2007 kl. 12.00.

**Umsókn skal sendast til**
*Stuðulsfólkaskipanin fyri børn*
*Almannastovan*
*Postboks 3096*
*110 Tórshavn*

Sosialurin







**Planet Terror** FRUMSÝNING

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 20.07 | kl. 17.45 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 21.07 | kl. 17.45 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 22.07 | kl. 17.15 | kl. 23.00 |




**Harry Potter**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 20.07 | kl. 17.30 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 21.07 | kl. 17.30 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 22.07 | kl. 17.00 | kl. 20.00 |




**Transformers**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 20.07 | kl. 20.00 |
| Leygardag | 21.07 | kl. 20.00 |
| Sunnudag | 22.07 | kl. 19.30 |




**Die Hard 4.0**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 20.07 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 21.07 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 22.07 | kl. 22.30 |

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu
www.bio.fo • Telefon 31 19 56